# Niclas Heri hoyrdi brakini

**Klaksvíkingurin Niclas Heri Jákupsson býr 500 metrar frá staðnum, har ein av bumbunum brast í London hósmorgunin. Niclas Heri hoyrdi tveir av brestunum, meðan hann var á veg í skúlan, har hann er á málskeiði**

YVIRGANGUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Niclas Heri Jákupsson, sum er á málskeiði í London í tvær vikur, býr skamt frá staðnum, har ein av yvirgangsbumbunum brast hósmorgunin.

– Eg búgvi einar 500 metrar frá staðnum, har ein bussur varð sprongdur í luftina, sigur hann.

– Eg var á veg í skúla í morgun, tá ið eg hoyrdi ein ógvusligan brest. Løtu seinni hoyrdi eg ein brest afturat. Nú er alt á gosi her í London, sigur hann í fartelefonini.

Í gjár koyrdi Niclas Heri runt í dupultdekkara í London, og hann koyrdi fram við nógvum av kendu støðunum mitt í býnum.

– Nú síggi eg júst ein slíkan buss verða sprongdan í luftina og liggja knústan á vegnum. Fólk eru øgiliga kløkk av hesum, sigur hann.

### Verður í London

Myndugleikarnir hildu á middegi hósdagin, at sjey bumbubrestir høvdu verið, og at atsóknir høvdu verið ímóti fleiri bussum.

– Beint nú bíða vit eftir nærri boðum her á skúlanum. Nógv fólk stúra, tí tey skulu koyra heimaftur í bussum ella toki. Eg búgvi so stutt her frá, at eg kann ganga heim, sigur Niclas Heri.

Hann hevur verið á málskeiði hesa vikuna, og tað heldur fram í næstu viku eisini. Niclas Heri ætlar sær at gera málskeiðið liðugt, áðrenn hann kemur heim.

– Fólk stúra eisini fyri, at tað kann henda meira, og tí kenna tey seg ótrygg beint nú. Eg síggi tað soleiðis, at tú skalt vera ótrúliga óheppin, um tú skalt vera raktur av eini slíkari atsókn, sigur Niclas Heri, sum er við gott mót og hevur tað gott í enska høvuðsstaðnum.




*London varð hósmorgunin lagt lamið, eftir at sjey bumbur eksploderaðu í miðbýnum*

*Mynd: Reuters*

**SKEMMAN**

**SØKIR HANDILSLÆRLING**

**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar fyrimunir!**

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 650 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingurin skal byrja 1. september.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn **innan 9. juli** til:

**SKEMMAN**

Staravegur 7 · Postboks 3278 ·110 Tórshavn
Tel.315588 · Mail: skemman@skemman.fo

Sosialurin 341800

# Terroristar fingu boðskapin út til allan heim

**London var hósmorgunin rakt av sjey bumbubrestum, sum legði allan býin fullkomiliga lamnan. Serfrøðingar meta, at ætlanin við atsóknini var at stegða øllum virksemi í býnum og at fáa ein boðskap út til allan heim**

TERROR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Hósdagin á middegi vistu fjølmiðlar at siga, at tvey fólk høvdu latið lív. Hinvegin høvdu eini hundrað fólk fingið álvarsligar løstir av spreingingunum. Øll sjúkrahús í London vóru í hægstu tilbúgving at taka ímóti løstaðum.

Hósdagin varð framvegis ikki heilt vist, hvør stóð aftanfyri hesa atsóknina, men BBC visti at siga, at ein jihad-heimasíða hjá Al-Qaeda hevði tikið ábyrgdina av álopinum.

### Boðskapurin skal út

Serfrøðingar í terrorismu mettu, at hendan atsóknin ikki hevði í hyggju at taka lívið av so nógvum menniskjum sum gjørligt, men fremsta ætlanin var hinvegin at fáa ein boðskap út til allan heimin.

Tony Blair var á beinleiðis skerminum á middegi, og hann boðaði frá, at hann fór av G8 fundinum í Gleneagles í Skotlandi. Fundurin heldur tó fram. Bretski forsætisráðharrin var sjónliga skelkaður av atsóknini.

Tað er ikki av tilvild, at hendan atsóknin verður framd júst hendan dagintann fyrsti dagurin á G8 fundinum, har tey ríkastu londini í heiminum eitt nú umrøða fátækradømi í Afrika og støðuna Miðeystri.

### London steðgaði upp

Hósdagin stóð alt virksemi fullkomiliga stilt. Undirgrundsbreytin varð stongd, og bussar koyrdu heldur ikki, eftir at bæði bussar og tokstøðir vóru rakt av bumbum.

Í London búgva 7 milliónir fólk, og so at siga at virksemi í miðbýnum stóð brádliga stilt.

Sera torført var at fáa fatur á fólki í London, av tí at fartelefon-netið ikki riggaði til fulnar.

**BILASØLAN ER OPIN LEYGARDAGIN KL. 10-18**

TEL 35 73 00 ELLA 21 73 00 · WWW.BILFRIDKAN.FO
LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

**Bilfríðkan** á Hjalla